

*Fleiri ættarlið vóru umboðað*



*Sigrid og Teitur settu sím dám á*

okkum øllum og hvussu vit troyta tað heldur enn júst at vilja troyta eitt møguligt oljutilfeingi. Tað tosaðu Herálvur Joensen frá Oljumálaráðnum og Rúni Hansen frá Statoil meira um. Og við sær til samkomuna hevði Statoilstjórin fyrsta oljufilmin, sum er gjørdur í Føroyum, um ta fyrstu oljuboringina nakrantíð. Eftir tað tosaði blaðstjórin á Sosialinum, Jan Müller um samfelagsligar avleiðingar av eini møguligari oljuvinnu. Hann helt fyri, at tað eru vit sjálvi, sum gera av, hvussu avleiðingarnar skulu vera, uppá gott og ilt.

Føroyskur matur, føroysk olja og loksins føroyskur tónleikur. Ungu og ediligu tónlistafólkini Sigrid Rasmussen og Teitur Lassen bergtóku bæði útisetar og gestirnar heimaífrá hesa ógloymandi løtuna - við sínum inniliga, hjartaliga og hugvekjandi sangi og tónleiki. Hon lesur tónleik í bretska høvuðsstaðnum, hann riggar til at koma á altjóða tónleikamarknaðin við spennandi og vælljóman di fløgu. Hóast løtan var stutt so sungu tey seg beint inn í tey føroysku hjørtuni við sínum vøkru fosturlandssongum.



*Borðreidd var við tí allarbesta føroyska viðskeranum*

Tað var annars John Rajani, føroyski sendimaðurin á donsku umboðsstovuni í Londum, sum beyð vælkomin til kvøldið, ið valt varð at kalla eitt evnis- og hugnakvøld. Hann greiddi frá, at Sendistova Føroya í Bretlandi byrjaði sítt virksemi 1. september 2002. Tað hendi eftir at Sofus Poulsen fór frá sum føryskt umboð í Aberdeen eftir drúgva og óføra tænastu. Tá gjørdi landsstýrið av at seta á stovn eina sendistovu í London.

John Rajani, sum saman við familju síni eftir øllum at døma, hevur funnið seg væl til rættis í tí nýggja stórbýar umhvørvinum langt heimanífrá og sum longu er farin í gongd við nógvar spennandi og fyri føroyingar týdningarmiklar uppgávur, fegnaðist um stóru luttøkuna. Hann vísti á, at sum sendistova hava tey ikki ábyrgdina av at taka sær av slíkum kvøldi men vildi man gjarna stuðla undir og hjálpa teimum, sum taka stig til slíkt. Tað hava undanfarnu árini verið sjálvbodnir føroyingar, sum búgva í London, ið hava virkað sum savnandi fyri føroyingar í Bretlandi, nevniliga Marjun Joensen King, Helgi Joensen og Louis Apol Wilson.Við felagsskapinum FISC, Faroe Island Solidarity Committie hava tey roynt at tala søk Føroya í Bretlandi, eitt nú við at greiða frá, hvussu grindadráp verður skipað í dag fyri harvið at ganga ímóti teimum bólkum í Bretlandi, sum royna at steðga grindadrápi. Tey hava so eisini skipað fyri árligu samkomunum fyri føroyingar, og vóru tey eisini øll hjástødd til løtuna.

Har vóru so bæði ung sum eldri. Nýggi sjómanspresturin , sum er settur í Hull, Hjørdis Kjærgaard, var har, har vóru føroyingar, sum hava búð í Bretlandi meginpartin av sínum lívi og har vórðu mong ung, sum nema sær útbúg ving í Bretlandi.

Tiltakið varð stuðlað av eitt nú Statoil, Smyril Line og Restorffs. Danska sendistovan lat høli til kvøldið.



*Tvey glað fólk - Harry Wilson og Ása Schrøder*



*Ingun í Skrivarastovu saman við børnum sínum*



Elttør setti sín dám á:

# Fegnaðist um samvinnuna við Bretland



*Eyðun Eltør „útfoldaði" seg fyri teimum mongu føroyingunum*

**FØROYINGAKVØLD**

*Jan Müller*

Sum serstakan gest til føroyingakvøldið í London nú um dagarnar hevði tað eydnast at fáa sjálvan Eyðun Elttør, landsstýrismann í olju- og umhvørvismálum at røða og hugleiða. Og tað gjørdi hann eisini væl og virðiliga. Segði seg vera veruliga glaðan fyri at vera í London og tosa við føroyingar her búleikast og hugleiddi hann yvir samvinnuna, sum hevur verið millum Føroyar og Bretland gjøgnum tíðirnar.

Frá tí at niðursetufólk úr Írlandi komu til Føroya, tá so frægir menn sum Nólsoyar Páll fóru við fullfermdum skipi úr Onglandi til Føroya men ikki spurdist aftur - tá bretar hersettu Føroyar og vóru móttiknir við opnum ørmum - til ísfiskatíðina, tá føroyskir bátar avreiddu í Bretlandi og til dagin í dag, har ein sera spennandi avbjóðing í eini komandi oljuvinnu stendur fyri framman.

- Vit vita ikki, nær og hvussu nógv vit finna av olju. Men her liggur ein ótrúliga stór avbjóðing framman fyri okkum, og vit skulu taka væl ímóti henni sannførdi landsstýrismaðurin fjøldina av føroyingum. Og hann helt fram: - Tað eru óavmarkaðir møguleikar í tí, sum liggur bæði í fiskivinnu og í oljuvinnu. Vit kunnu menna okkum, gera okkum betri á skúlaøkinum og vit kunnu lyfta okkum mentanarliga uppá eitt sera høgt støði í sambandi við eina oljuvinnu.

Eyðun Elttør, sum er ein av trúgvu stuðlunum hjá Brøðrasamkomuni, kom eisini inn á andaliga økið, har vit somuleiðis fingu so nógv frá okkara grannum eitt nú í Bretlandi, haðani fólk komu til Føroya og sum fingu stóran týdning fyri okkara andaliga og mentanarliga lív og sum gjørdu okkum ríkari .

Eyðun Elttør helt tað vera eina dygd fyri eitt fólk, at tað fer burtur í onnur lond at nema sær kunnleika og royndir og so koma heimaftur við einum førningi, ið aftur kann koma so mongum øðrum av sínum landsmonnum til góða.

Einki var at ivast í, at landsstýrismaðurin kendi seg so ómetaliga væl millum sínar landsmenn, útisetarnar í London. Og hann kundi tí heldur ikki í síni eyðmýkt lata vera við at taka í egnan barm sum politikari: - Á politiska økinum er eisini neyðugt at hugsa um, hvussu onnur hava tað. Hvat er tað man er settur til sum politikari ! Er tað ikki at hugsa og fjálga um onnur, so tey koma at hava tað gott.

Hann nam við tað at fáast við politikk sum ein atburð - hvussu tú ber teg at móti tínum næsta, móti øðrum menniskjum. -Tað merkir m.a., at vit skulu hátta okkum skilagott fyri, at onnur skulu hava tað gott , og at vit skulu liva saman í einum góðum landi og eisini tit sum útisetar her í Onglandi. Við hesum orðum vónaði landsstýrismaðurin, at útisetarnir ikki gloymdu sítt heimland - sum heldur ikki vildi gloyma teir.



*Eini 70 fólk vóru við til hugnakvøldið á donsku sendistovuni*




*Annika Høydal var komin til London at vitja beiggja sín Kjartan*